Starv

## Starvsfólk til teknisku deild

Í sambandi við at starvsfólk fer í annað starv, verður við hesum søkt eftir einum starvsfólki til teknisku deild á Strandfaraskipum Landsins.

**Uppgávurnar hjá teknisku deild**

Tekniska deild skal veita leiðsluni í fyritøkuni eina úrslitagóða tekniska fyrisiting, herundir samskipa, viðlíkahalda og menna teknisku stýringina hjá fyritøkuni.

**Høvuðsuppgávur**

- Tryggja ein støðugan og tryggan rakstur av skipum, akførum o.ø.
- Fremja ráðlegging, fyriskipan, raðfesting, samskipan og eftirlit í sambandi við teknisku stýringina
- Seta upp viðlíkahaldsmannagongdir og viðlíkahaldsætlanir
- Gera ætlanir um størri viðlíkahaldsarbeiðir og dokking
- Gera yvirlit yvir anlegg og útbúnað til stýringarendamál
- Meta um viðlíkahaldstørvin á anleggum og útbúnaði
- Fyriskipa verkætlanir við størri broytingar innanfyri tekniska økið
- Gera yvirlit yvir manningar og onnur starvsfólk til nýtslu í sambandi við teknisk fyrisitingarliga ráðlegging
- Undirvísing og upplýsing um trygd á skipum, akførum o.ø.

**Starvið fevnir um**

Verða við til at sambinda deildina við skipini, verkstøð, buss- og lastbilførarar, ymsu eindirnar uttanfyri høvuðsskrivstovuna o.a.

**Fyriskipan og eftirlit við dokkingum**

Fyriskipan av størri viðlíkahaldsarbeiðum, herundir innheinta tilboð, raðfesting og uppfylging Viðlíkahalda og útbyggja trygdarskipanir á skipunum, herundir ISM o.a.

Fremja leypandi operationelt eftirlit umborð á skipum, bussum og lastbilum

Verða við til at menna teknisku stýringina við nýtslu av nútímans tøkni

Talan er um eitt spennandi starv í einum umhvørvi við møguleika fyri persónligari og fakligari menning.

**Førleikakrøv**

- Verkfrøðingur ella tilsvarandi hægri útbúgving
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Kunnleiki og royndir viðvíkjandi rakstri av skipum
- Kunnleiki og royndir í Microsoft Office forritum
- Góð evni at orða seg bæði skrivliga og munnliga á føroyskum og enskum
- Kunnleika og royndir viðvíkjandi arbeiðshátti á skipasmiðjum og verkstøðum
- Kunnleiki til lógarkrøv innanfyri rakstur av ferðamannaskipum ein fyrimunur
- Kunnleiki til ISM ein fyrimunur

**Setanartreytir**

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi yrkisfelag.

Arbeiðsstað á høvuðsskrivstovuni í Tórshavn og eisini úti á ymsu rakstrareindunum.

**Umsóknir**

Umsóknir við avritum av prógvum, ummælum, CV og tilvísingum skulu sendast til:

***Strandfaraskip Landsins***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 14. apríl 2000 kl. 12:00.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Magnus Magnussen, tekniskur leiðari tlf. 34 30 00 ella við E-mail: mam@ssl.fo

*Strandfaraskip Landsins er ein landsfyritøka undir Vinnumálastýrinum / Samskiftisdeildini.*

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

STRANDFARASKIP LANDSINS

## Starv sum havnaumsjónarmaður við Fuglafjarðar havn

Starv sum havnaumsjónarmaður við Fuglafjarðar havn verður hervið lýst leyst til setan tann **01. juni 2000** ella so skjótt sum til ber.

**Krøv:** Útbúgving sum navigatørur somuleiðis sum góður kunnleiki til enskt er ein treyt.

Lønar- & arbeiðstreytir verða sambært sáttmála millum Fuglafjarðar býráð og Føroya Skipara- & Navigatørfelag frá 05. juni 1997.

Starvið verður lønt sambært lønartalvuni fyri havnaumsjónarmenn.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Kristian Oluf Christiansen, havnameistara á telefon 444054 ella til Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á telefon 444006 lokal 11.

Fyrsta árið verður at rokna sum royndarár.

Møguligar umsóknir saman við avriti av prógvum møguligum viðmælum skulu vera **Fuglafjarðar kommunu** í hendi í seinasta lagi mikudagin **26. apríl 2000 kl. 16.00.**

Kommunan skilar sær rætt til frítt at velja millum innkomnar umsóknir ella eisini onga at taka.

Fuglafjørður, tann 06. apríl 2000

**Fuglafjarðar býráð**

## Fólk søkist

Søkt verður eftir fólki til at umlætta familju við tveimum brekaðum børnum í høvuðsstaðnum.

Talan er um náttarvakt tríggjar nætur um vikuna í heiminum hjá familjuni. Arbeiðstíðin er frá kl. 23.00 til 7.00 og eftir avtalu við familjuna hvørjar nætur talan er um.

Lønar- og setunarviðurskiftini eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi fakfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja tlf. 314822, Ragnhild Dahl ella Innu Sigvardsen, tlf. 315480 millum kl. 9–13, tó ikki mikudag.

Umsóknir mugu vera okkum í hendi skjótast gjørligt og skulu sendast til:

**Almannastovuna**
att. Inna Sigvardsen
Postboks 196
110 Tórshavn

## Umsitingarleiðari

Á Fiskirannsóknarstovuni er starv sum leiðari av umsitingini leyst at søkja.

Starvið er beinleiðis undir stjóranum at standa fyri og leiða umsitingina av stovninum og fiskirannsóknarskipinum »Magnus Heinason«.

Til starvið er neyðugt við nøktandi útbúgving á hægri støði (HD ella líknandi) og við royndum innan umsiting og edv førleika.

Starvið verður lønt eftir avtalu millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Miðað verður í móti at seta starvið frá 1. mai ella so skjótt sum til ber aftaná hetta.

Umsóknir við avritum av prógvum og viðmælum verða at senda Fiskirannsóknarstovuni innan 15. apríl 2000.

**Fiskirannsóknarstovan**
Nóatún 1, Postrúm 3051
FO-110 Tórshavn
Tlf. 315092, Fax 318264

## HJÁLPARFÓLK SØKIST

**Vit sóknast eftir einum drongi ella gentu at arbeiða eftir skúlatíð til fyrifallandi arbeiði.**

**Fyrimunur er um viðkomandi hevur koyrikort og royndir innan handil.**

**Skrivligar umsóknir skulu vera inni innan 15. apríl 2000 og sendast til:**

Kai Andreasen & Co
Postboks 1200
100 Tórshavn
viðm. Hjálparfólk

Sosialurin - 311820

**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

## Eykaaðalfundur

Eykaaðalfundur hjá Fimleikafelagnum Ljósinum verður hildin í ÍSF-húsinum sunnudagin 16.04.00 kl. 15.00. Skrá: Broyting av lógum felagsins.

**Nevndin**



**ADC-Heilsølan**
*Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893*

**ARBEIÐSHANDSKAR**
*Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi*

**LANDSINS STØRSTA ÚRVAL**
*frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar*

ADC

**BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA**


Nr. 70 - 8. apríl 2000 tíðindablaðið sosialurin 

# Lýsingartorgið

**Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:**
- ✓ privatar lýsingar
- ✓ í mesta lagi 40 orð
- ✓ bert ein lutur í hvørjari lýsing
- ✓ hægsta søluvirði 20.000 kr.

**Lýsingar, gjaldast skal fyri:**
**Vanl. lýsingaprísur:**
- ✓ frá fyritøkum og virkjum
- ✓ fleiri enn 40 orð
- ✓ søluvirði oman fyri 20.000 kr.

**tó minst 50,- kr. + MVG hvørja ferð:**
**Lýsingar, gjaldast skal fyri:**
**50,- kr. + MVG hvørja ferð:**
- ✓ lýsingar undir teigunum: »Dansur«, »Fundir« og »Matur«
- ✓ Bill. merktar

## Akfør

**BILAR TIL SØLU**
Ein Mazda 323 hatcback. Árg. 86, er sýnaður í 99, til sølu um hóskandi boð fæst. Og ein Mazda 626 sedan árg.´83, er sýnaður í ´99, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 316142

**EYKALUTIR**
til Toyota Camry Liftback, árg. 84. Tlf. 441524

**FELGUR**
Fýra felgur til Datsun Micra 200 kr. Tlf. 211555

**FORD ESCORT**
1800 i, sport, frá okt. ´94, í sera góðum standi.
Tlf. 312934

**FORD FIESTA**
Árg.´88 til sølu.
Tlf. 457242

**FÝRA FELGUR**
4 Alu-felgur til BMV 500 seriuna til sølu
Tlf. 21 77 04

**HONDA ACCORD 2.0**
árg. 86, bíliga til sølu. Sportsfelgur fylgja við. Hevur ikki plátur.
Tlf. 452101

**MAZDA 323 I.F. 1,6**
Grønur, modell v/ klapplyktum, árg. 93, sær gott út og er sera økonomiskur. Til sølu ella í býti við diesel bil.
Tlf. 283902

**MAZDA 323 TIL SØLU**
1.5 GT, tvær hurðar, gulur, árg. 87, originalar alu-felgur, góð heilársdekk 185/60-14.
Tlf. 220033
ella 448133

**MAZDA 626**
árg. 84, til sølu sum eykalutir fyri 1.800 kr. Motorur og annað er í góðum standi.
Tlf. 441145

**MAZDA 626**
coupe 2.0, árg. 85, til sølu sum eykadeilir, heilir ella í deilum.
Tlf. 210007

**MAZDA 626 2,0**
cupé, nýsýnaður, árg 10/86m 150.000 km. Senkaður, sportfelgur, nýggj summardekk 205/50-15, vetrardekk á stálfelgum, el-rútar, el-sóltak. Prísuppskot 20.000 kr.
Tlf. 221202

**NISSAN BLUEBIRD**
hvítur, T 12, 2.0 SLX, árg. 89, hevur el-rútar, el-sóltak, centrallás og powerstýring, sýnaður í feb. 2000, bíliga til sølu.
Tlf. 212359

**NISSAN BLUEBIRD 1.8 GL**
Árg. 86, til sølu fyri sámuligan prís.
Tlf. 455951

**OPEL ASCONA 1.6 S**
hvítur, árg. 87, sýnaður 07/99 og umvældur fyri kr. 8.000,- til sølu fyri 12.000,-.
Tlf. 215696

**OPEL ASTRA**
cdx til sølu, árg. 8/98.
Tlf. 316365

**OPEL VECTRA 2.0i**
árg. 89, bíliga til sølu.
Tlf. 375002

**OPEL VECTRA 2.0i**
árg. 89, bíliga til sølu.
Tlf. 375002

**PEUGEOT 309 GT**
Svartur, árg. 87, koyrt 152.000 km, 1900 motor, 5 gear, sýnaður í mars 2000. Útgerð s.s. tónaðar rútar, sentrallás, el-rútar, hita í setrunum v.m.
Tlf. 282116

**PÍKADEKK**
Fýra st píkadekk 175/70 R14, 800 kr.
Tlf. 211555

**SPORTSFELGUR**
205x50xR16, 1 ára gamlar, til sølu fyri 7.000 kr. (Nýprísur 10.000 kr.)
Tlf. 444787

**SUMMARDEKK**
4 st. summardekk á felgum, Goodyear til Toyota HiAce 185 R14, nýprísur 6.000 kr. nú 3.000 kr.
Tlf. 211555

**SUMMARDEKK**
1 st.175/70, R 13 200 kr.
Tlf. 211555

**SUMMARDEKK**
1 st. 175/70, R13 200 kr.
Tlf. 211555

**SUMMARDEKK**
175/65, R14, 1000 kr.
Tlf. 211555

**SUMMARDEKK TIL SØLU**
Tvey Tyfoon summardekk á felgum, 185/65 R14, og tvey Michelin summardekk á felgum 185/65 R14.
Tlf. 444662

**SUZUKI SWIFT**
árg. 87, gráur, hevur bert koyrt 125.000 km. Bilurin er í ógvuliga góðum standi, hevur nýggj Lamell heilársdekk. Hann stendur hjá Bilasøluni Øssur Johannesen. Prísur: 10.000 kr. sum hann stendur. Skal til umsýn fyri svingarmarnar, annars er alt í fínasta standi.
Tlf. 321617 ella arb. 316250 lok. 125

**TIL SØLU**
Toyota Corolla 1.6 GSI, árg. 92, 117.500 km, sport kabinu, sportfelgur, spoylarar, sóltak, powerstýring, sentrallás, vel, gáttir, tuningsútstoyt og el spegl. Píkadekk á felgum fylgja við.
Tlf. 214470, e. kl. 16.15

**TIL SØLU**
Golf 1.6 GL, árg. 87.
Tlf. 221021

**TIL SØLU**
Fýra eldri 14" sportsfelgur til sølu fyri 150 kr. stk. Passa til Mazda.
Tlf. 210007

**TIL SØLU**
KIA Sephia 1,5 GTX til sølu. Grønur, árg. 6/97, koyrt 42.000 km, vælhildin, tvey sett av felgum, stereo við fløguspælara, absbremsur, 2 airbags, fjarstýrt sentrallás o.a.
Tlf. 311122, lokal 32
Heima: 317241
e-mail: eh@balslev.fo

**TIL SØLU**
Fýra sportsfelgur við dekkum, 15"/195/60, bíliga til sølu.
Tlf. 211221

**TIL SØLU**
Opel Ascona 2,0i GT, árg. nov. 87, sýnaður í mars 2000, til sølu fyri 15.000 kr.
Tlf. 316736 ella 318144

**TIL SØLU**
Peugeot Speedfight, sum nýggjur, einans koyrt 400 km, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 221144

**TIL SØLU**
Ford KA, árg, 3/99, koyrt 11.000 km, 1,3 motor, el-rútar, til sølu fyri 95.000 kr.
Tlf. 328120 ella 313853
Dorthea Winther

**TIL SØLU**
Toyota HiLux, 4X4, 15 mðr. gamal, við skaða, til sølu.
Tlf. 221455

**TIL SØLU**
Daihatsu Charma til sølu fyri 8.500 kr. Krevur ábøtur.
Tlf. 320543

**TIL SØLU**
Scania T 112 v/ lítlum krana til sølu, um hóskandi boð fæst.
Tlf. 312945, e. kl. 20

**TIL SØLU**
Toyota Corolla, 14 ára gamal, við góðum píkadekkum og stereo anleggi til sølu fyri 7.500 kr. Sýnaður 6/99.
Tlf. 456759

**TOYOTA COROLLA**
1,3 XLI Calla sedan, árg. ´95, nýsproytaður, nýsýnaður til sølu.
Tlf. 281804

**TOYOTA COROLLA**
AE82, árg. ´86, til sølu sum eykalutir.
Tlf. 216195

**TOYOTA COROLLA**
Árg.´84, model AE 80, 1,6 hevur plátur. Ein annar fylgir við sum eykadeilir. 6.000 kr.
Tlf. 421040

**TOYOTA COROLLA 1,6**
GSI árg.´92. 117.500 km. Sport cabinu, sportfelgur, spoularar, sóltag, power stýring, sentrallás, vel, gáttir og el-spegl, píkadekk á felgum fylgja við.
Tlf. 214470 eftir kl. 16.15

**VW GOLF II**
árg. 88, í góðum standi, til sølu fyri 20.000 kr.
Tlf. 218778

**VW JETTA TX**
gráur, árg. 5/87, 170.000 km, ein eigari, vælhildin, til sølu.
Tlf. 317484 ella 284345

## Arbeiði

**ARBEIÐI YNSKIST**
Genta 14 ár ynskir arbeiði eftir skúlatíð.
Tlf. 315634

**ARBEIÐI YNSKIST**
Íslendsk familja, maðurin føroyingur. Eg søki arbeiði í Tórshavn, eri vanur við spreingiarb., múraraarb., vegarb. asfalt. Havi eisini Truck certifikat.
Vinarliga ring
tlf. 0035471939, Frank

**FA. HÚSAUMVÆLING: TIMBURARBEIÐI**
Alt timburarbeiði verður gjørt.
Tlf. 215214

**MAÐUR YNSKIR**
kjans við báti, ið roynir við snellu, alt hevur áhuga.
Tlf. 281909
best aftaná kl. 18

## Barnaútgerð

**BRIO KOYRISTÓLUR**
í sera góðum standi til sølu. Posi og regnslag fylgja við. Prísur 2.000 kr.
Tlf. 318274
eftir kl. 18

**ER TAÐ**
nakar, ið eigur ein barnagangistól at selja mær?
Tlf. 372135

**KOYRISTÓLUR**
4 mánaðar gamal til sølu fyri einans 1500 kr. nýprísur 2500 kr. v/posa, regnslag, borð til stólin.
Tlf. 312908, Frida

**KOYRISTÓLUR**
við koyriposa til sølu.
Tlf. 221266

**NETGRULVIGARÐUR**
Netgrulvigarður fæst við at avheinta hann.
Tlf: 310243

**PUSLITASKA**
til sølu.
Tlf. 210007

**SIMO TVÍBURÐAVOGNUR**
líka vælegnaður til stykin jøvn á aldri, eins og tvíburðar, við ella uttan lift/um. Er spildurnýggjur. Nýprísur 5.800 til sølu fyri 3.900.
Tlf. 0045 22156308
eftir kl. 15

**TIL SØLU**
Brúktur bilstólur, sum nýggjur, til sølu.
Tlf. 312968

**TIL SØLU**
Grøn lift og seingjarsett, ið hóskar til, til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 317180

**TIL SØLU**
Myrkabláur Brio barnavognur við myrkabláum regnslagi, Lítið brúktur og vælhildin. Brúktur til eitt barn. Til sølu fyri 2.600 kr.
Tlf. 310917
/211134

## Barnaansing

**AU PAIR**
Par við 2 børnum søkja gentu, helst við koyrikorti, í minst 1 ár. Vit búgva 60 km sunan fyri Keypmannahavn. Áhugað kunnu ringja til Turið og Henrik á
tlf. +45 57644146

**BARNAANSING**
Kundi tú hugsað tær at ansa eftir Magnusi, trý og eitt hálvt ára gamal, og Guðruni, hálvt ára gomul, so ring til Kamillu tlf. 316005 ella 361170. Vit búgva úti á Reyni og tú kanst búgva hjá okkum.

## Bátaútgerð


**YANMAR BÁTA-MOTORAR**
**-frá 9 HK til 420 HK.**
**Vit selja og umvæla Yanmar bátamotorar.**
**Tosið við okkum og fá eitt gott tilboð**
THOMAS DAM amboð & maskinur
Tel. 31 04 44 • Fax 31 78 38


**AWI 23**
Sailor radio, Sailor VHF, Sjálvstýrara, Furuno ekkolod, GBS og Cetrek kortplottara, Viking 4 pers. Redningsbátur, Volvo Penta motor, við fiskiloyvi. Til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 456967 ella 456954
eftir kl. 18

**BÁTAMOTORUR**
av slagnum 10 HK Saab, skrúvutoy og ein tangi.
Tlf. 211543

**BÁTAMOTORUR**
diesel, 23 HK, Volvo Penta lítið brúktur til sølu. Hittist best millum 9-18
á tlf. 288454

**BÁTAMOTORUR**
Ein 17 HK Sole bátamotorur, sundurtikin, toppstykki renovera, til sølu fyri kr. 2.500,-
Tlf. 218999

**BRÚKTAR AUTOMATISKAR SNELLUR**
Vit hava nakrar bíligar, brúktar snellur á goymslu. Snellurnar verða seldar við garantii.
Tlf. 212422

**GLASTREVJABÁTUR**
ynskist til keyps. Stødd: 22-24 føtur, kostnaður: ca. 40.000 kr.
Tlf. 314434

**PÁHANGSMOTORAR**
15–20 páhangsmotorar bíliga til sølu. 3–25 H.
Tlf. 213536

**TIL SØLU**
15 t. deksbátur við fiskloyvi 4A, til sølu um hóskandi boð fæst. Krevur ábøtur.
Tlf. 441760,
e. kl. 18

## Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir *(set X)*
undir teiginum:

| | | |
|---|---|---|
| ❑ Akfør | ❑ Amboð | ❑ Arbeiði |
| ❑ Barnaansing | ❑ Barnaútgerð | ❑ Bátaútgerð |
| ❑ Bingo | ❑ Brævaskifti | ❑ Burturm./funnið |
| ❑ Býli | ❑ Bøkur | ❑ Dansur |
| ❑ Dýr | ❑ Fundir | ❑ Húsarhaldstól |
| ❑ Innbúgv | ❑ Lutaseðlar | ❑ Leikur |
| ❑ Matur | ❑ Pløgg | ❑ Samband |
| ❑ Súklur | ❑ Teldur | ❑ Tónleikur |
| ❑ Út- & sjónvarp | ❑ Ymiskt | ❑ ……………… |

**Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12.00. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi**

Sent hevur:

Navn: ……………………………………………

Bústaður: ……………………………………………

Bygd/býur: ……………………………………………

Tlf.: ……………

»Lýsingartorgið«
*Tíðindablaðið*
**Sosialurin**
Box 76,
110 Tórshavn

Til frímerki